## … um Guligans

Guligans hava verið slóðbrótandi fyri áskoðaramentanina í Føroyum. Teir hava veitt liðnum ein ótrúligan stuðul og uppbakkning. Bæði í viðgongd, og eisini í mótgongd. Vit virðismeta teirra stuðul.



## … um lokaluppgerðir ímóti B68

Eg gleði meg ótrúliga nógv til tær tríggjar lokaluppgerðirnar ímóti B68 næsta ár. Tað er, sum um nakað manglar tá B68 ikki er í bestu deildini. Sjálvur fekk eg debut ímóti B68 í bestu deildini, afturi í 1994."

# ein dyst í senn!



*- Konan Tóta skil spæli›, tí hon spældi fótbólt fram til Gentur 14-17 ár, skemtar Óli. Tóta og lítli fitti Heri eru heimliga baklandi› hjá Óla Hansen. Mynd: Álvur Haraldsen*

ongantíð hoyrt um eitt land, sum eitur "HamKam"!".

### Stríðist fyri plássinum

Óli er sera fegin um at verða sloppin á landsliðið aftur. "Eg fari at gera mítt ítarsta fyri at sleppa at byrja inni ímóti Italia á útivølli" sigur Óli avgjørdur. Hann hevur fingið boð frá Jógvani Martin Olsen at koma til venjingarnar, sum verða áðrenn landsliðið verður endaliga úttikið til síðsta dystin í Modena, hin 21. november. Òli viðgongur, at tað hevur verið ein kensluligur rutsju-túrur. Fyrst sigurin á VB/Sumba, sum staðfesti Føroyameistaraheitið hjá NSÍ. Síðani at standa í verjuni á landsliðnum í Kiev, og koma í eitt ódnarveður, og eitt ótrúligt trýst, sum fá føroysk fótbóltslið hava verið út fyri. Og so at fara norður til Klaksvíkar eftir FM-steypinum. Tað hevur ikki gingið eftir vild hjá landsliðnum. Men Óli sær bjart uppá framtíðina hjá landsliðnum. Yngru landsliðini hava fingið nøkur framúrskarandi úrslit, sum ger at ljósið fyri framman er bjartari. Òli heldur eisini, at landsliðið hevur fingið ov nógvar órættvísar skolur, og ov nógv óneyðug høgg síðstu árini.

### Baklandið stuðlar

Konan hjá Óla; Tóta spældi sjálv fótbólt fram til aldursbólkin Gentur 14-17 ár. "So hon skilir spælið" skemtar Óli. Tóta og tann lítli fitti Heri eru heimliga baklandið hjá Óla. Tóta er spent til hvønn dyst hjá NSÍ og Óla. Hon er uppá pláss við Løkin til næstan hvønn heimadyst. Og burtursæð frá útidystunum í Suðuroy, og á Sandi, so hevur hon verið til flestu útidystirnar hjá NSÍ í ár. Og viðgongur Óli, at tað ikki hevði gingið, um Tóta ikki stuðlaði honum so væl. Dagliga starvast Óli, sum er útbúgvin Akademiøkonomur frá Kolding Købmandsskole, sum leiðari fyri "Kryvjing og sølu" hjá P/F Luna, sum Gregersen-mennirnir úr Gøtu eiga. Óli hevur starvast á Luna síðani januar í 2000. Síðan januar í ár hevur hann starvast í Sørvági. Arbeiðið, ferðing í samband við arbeiðið, og fótbólturin krevja sítt. Og tí hevur Òli ikki tíð at fáast við onnur frítíðarítriv. Óli tekur ein dag, og ein dyst í senn. Habilitetur og stabilitetur ganga hond í hond.

## Fakta

Navn: Óli Hansen
Føðingardagur: 26. november 1977
Bústaður: Á Heygnum 19
í Saltangará
Kona: Tóta N. Klakkstein
Barn: Heri, 2 ár
Útbúgving: Matematiskur studentur og Akademiøkonomur
Feløg: NSÍ, GÍ og Kolding IF